# Landsfundir um vikuskiftið

**Bæði Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava sín árliga landsfund um vikuskiftið. Gestarøðararnir hjá flokkunum verða Hanus Kamban og Jón Kristiansson, sum fara at siga nøkur á fundunum hjá ávikavist Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum**



*Tveir av polunum í føroyskum politikki seinastu mongu árini, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin, fara at hava sína árliga landsfund um vikuskiftið*

LANDSFUNDIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tveir av polunum í føroyskum politikki seinastu mongu árini, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin, hava sín árliga landsfund um vikuskiftið. Javnaðarflokkurin fer til Suðuroyar at halda landsfundin í ár, meðan Fólkaflokkurin leitar sær til Sandavágs.

Báðir flokkar høvdu upprunaliga lagt landsfundin seinasta vikuskiftið, men av ein ella aðrari orsøk vórðu fundirnir útsettir eina viku.

### Fýra serevni

Javnaðarflokkurin hevur sett fýra serevni til umrøðu, sum skift verður orð um leygardagin. Javnaðarfólk fáa høvi til at siga sína hugsan um høgra snaringina, eldrapolitikkin og serforsorgin, reyð-grøn dagsskránna og privatiserringar /sølu av almennum ognum. Úr Javnaðarflokkinum siga tey, at tað verður eitt upplegg um øll fýra evnini, har síðan fólk í salinum fáa møguleika at siga sína hugsan um evnið. Fólkaflokkurin hevur ikki valt at viðgera ávís evni á landsfundinum í ár, men talan verður heldur um eitt frítt orðaskifti um samfelagið sum heild.

### Gestarøðarar

Sum vanligt er á landsfundum, so hava bæði Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin gestarøðarar á fundunum í ár. Fólkaflokkurin hevur bjóðað íslendinginum Jón Kristianssyni, sum millum annað hevur verið alment frammið um, at hann ikki tekur undir við tilmælunum hjá ICES. Hann hevur fyrr í ár verið rættiliga kritiskur um tilmælini hjá fiskifrøðingum, og um hvussu fiski tilfeingið skal troytast

Úr Fólkaflokkinum siga tey, at sum vinnuflokkur burturav er tað sera hóskandi at fáa Jón Kristiansson at siga nøkur orð, tí hann hevur øðrvísi sjónarmið á okkara tilfeingi enn føroyskir fiskifrøðingar.

Hanus Kamban verður gestarøðari hjá Javnaðarflokkinum í ár. Hann hevur fyrr í ár verið í blaðkjaki um sjálvsstýrismálið, og úr Javnaðarflokkinum vænta tey, at hansara upplegg fer júst atviðgera sjálvsstýrismálið. Hanus hevur sett nógvar spurningar um sjálvsstýristilgongdina hjá samgonguni

### Bara leygardagin

Fólkaflokkurin hevur sett bert leygardagin av til landsfundin, sum byrjar klokkan 10 leygarmorgunin í SÍF-húsinum í Sandavági. Úr Fólkaflokkinum verður sagt, at øll fólkafloksáhugað skulu verða hjartaliga vælkomin.

Javnaðarflokkurin leggur eitt sindur meira fyri, og hevur sett bæði fríggjadagin og leygardagin av til landsfundin hjá flokkinum. Landsfundurin verður settur fríggjakvøldið klokkan 19.30 í Hvalbiar Skúla, og hildið verið fram til leygardagin. Veitslan verður klokkan 19.30 í Royn høllin leygarkvøldið. Øll javnaðaráhugað eru hjartaliga vælkomin.




# Álmanakkin 2004 komin

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Aftur í ár ber føroyski álmanakkin hjá H.N. Jacobsens bókahandli boð um, at árið er farið at halla, og at eitt nýtt ár er á veg. Í Álmanakkanum 2004 er sum vænt nogv at finna um nýggja árið.

Í fyrsta parti er m.a. sjálvur álmanakkin, yvirlit yvir sól- og mánastøður í árinum og tað, sum vert er at vita um gongustjørnur og annað á himmalhválvinum í 2004.

Síðani koma nógv nýttu streymkurvarnar, talvan við vestfalskyrrindunum og streymkort saman við lista yvir motorbátar undir 20 tons. Listin við skipum yvir 20 tons er aftur í ár prýddur við myndum av skipunum. Í hesum pørtunum eru sum vænt nógvir aðrir hentir og dagførdir upplýsingar av alskins slag til sjóvinnuna. Av nýggjum í ár eru upplýsingar um MRCC-støðina og yvirlit yvir, hvussu fram skal farast, tá oljudálking kemur fyri á sjógvi ella landi.

Tilfarið um landbúnaðin, alivinnuna og oljuvinnuna er eisini dagført, og tað eru nógvu hentu upplýsingarnir aftast í álmanakkanum sjálvandi eisini.

Føroyski álmanakkin 2004 er 440 síður, og hann fæst bæði innbundin og heftur.






*GULT, GRØNT OG REYTT. Arctic Viking flaggar út til bíligari farvøtn í eini roynd at bjarga lívinum*

*Myndaviðgerð: Álvur Haraldsen*

# Yvirliva við bíligari arbeiðsmegi

**200 kr um dagin. Tað er helst upphæddin, sum litavisku fiskimenninir umborð á Arctic Viking fáa, nú skipið flaggar út. Formaðurin í Starvsmannafelagnum talar harðliga at og kallar tað at útnytta bíliga arbeiðsmegi. Hetta er ein roynd at yvirliva, sigur reiðarin. Formaðurin í Fiskimannafelagnum lastar politisku skipanini fyri ráðaloysi.**

ÚTFLAGGING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Gulu, grønu og reyðu litirnir fara at veitra yvir rækjuskipinum Arctic Viking næstu tvey árini.

Fiskimálaráðið hevur loksins gingið umbønini á møti frá reiðarinum Líðini í Kollafirði at flagga út. Treytin er, at landskassans pantibræv framhaldandi skal hava fult gildi, og at niðurskrivingin av skuldini steðgar, meðan skipið er undir litaviskum flaggi.

Johan Joensen, reiðari á Arctiv Viking, er fáorðaður um, at loyvið loksins er fingið at flagga út.

– Vit hava fingið loyvið og handla út frá tí. Vit ganga undir treytirnar, sum Fiskimálaráðið hevur sett. Tær eru, sum vit væntaðu, sigur Johan Joensen.

Nær Arctic Viking flaggar út, fær hann ikki sagt enn. Fyrst skulu pappírini fáast upp á pláss. So skjótt tað formliga er í lagi, fer meginparturin av føroysku manningini í land, og litaviska manningin yvirtekur føroysku koyggjurnar. Bara ein lítil partur av manningini verður føroyskur, upplýsir reiðarin.

### 1000 dollarar

Reiðarin vil einki siga um, hvat tað merkir fyri raksturin á Arctic Viking, at skipið nú verður mannað við bíligari arbeiðsmegi.

– Hetta er ein roynd hjá okkum at yvirliva. Vit gera tað, tí tað er eitt neyðugt stig fyri at fáa endarnar at røkka saman, og meira tími eg ikki at viðmerkja um hetta málið, sigur Johan Joensen.

Helst fáa litavisku fiskimenninir umborð á Arctic Viking einar 1000 dollarar um mánaðin. Tað svarar til einar 200 føroyskar krónur um dagin. Hetta er vanliga støðið eystanfyri, upplýsir Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum.

### Moralskt forkastiligt

Er reiðarin fámæltur, so er Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum alt annað. Hann heldur tað vera »moralskt forkastiligt«, at Føroya land setir sítt bláa stempul á ætlanina.

– Tað er ófatiligt, at vit skulu bjarga okkara arbeiðstólum við at gera okkum dælt av støðuni í einum landi, sum ekur á knøunum. Vit tosa um rættindini hjá fólkum, sum koma hendan vegin at arbeiða, men nú fara vit í besta stíli og halda teirra láglønarsamfelagi viðlíka. Tað er at vanvirða teirra stríð fyri betri korum. Tað er at misnýta fólk. Vit útnytta teirra armóð og elendigheit, og vit halda teirra kriminalitet viðlíka, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

### Eitt bæði og...

Formaðurin í Fiskimannafelagnum, Óli Jacobsen, er meiri diplomatiskur. Hann heldur lítið um, at skipið flaggar út, men hann hevur meiri forstáilsi fyri reiðaranum.

– Sjálvandi er hetta kyniskt, men eg haldi tað liggur politisku skipanini meiri til last enn reiðarínum. Her er eingin politikkur á økinum, og landsstýrismaðurin (Jacob Vestergaard, blðm.) hevur ikki rætt fingur frá síðu fyri at kanna, hvussu rækjuflotin kann bjargast, sigur Óli Jacobsen.

Spurdur, um tað er moralskt í lagi, at eitt reiðarí velur at troyta bíliga arbeiðsmegi uttanlands fyri at yvirliva, svarar formaður í Fiskimannafelagnum·

– Bæði og... Hetta er ein hóttan fyri okkara arbeiðsmegi, tí vit kunnu ikki kappast við hasar lønirnar. Men samstundis mugu vit viðganga, at eysturlendingarnir gera eitt kupp. Hetta er meira enn ein hampiligi løn í teirra londum. Áður var bílig arbeiðsmegi veruliga útnyttað, og talan var um trælaløn. Hetta lønarlagið er hóast alt ein avleiðing av, at altjóða transportfelagið hevur fingið ein serligan sáttmála í lag fyri hesi londini. 1000 dollarar um mánaðin verður roknað fyri ein góð løn eftir teirra mátistokki, sigur Óli Jacobsen.

Rækjuvinnan, sum áður dróg reyðargull til Føroyar, er í svárari kreppu, og spurningurin er, um hon stendur til at bjarga. Eitt uppskot liggur í tinginum frá andstøðuni, og hóast Óli Jacobsen ikki sigur seg vera talsmann fyri studningi, so eftirlýsir hann líkarætt.

– Farmaskipaflotin er fyri ein part bygdur á studning, tí hann hevur FAS-skipanina. Tað er løgið at røkja ein part av flotanum, tá mann ikki eingang vil tosa um, hvat kann gerast fyri restina av flotanum. Ábyrgdin liggur hjá landstýrinum, men tað velur lættastu loysnina at útflyta trupulleikan, sigur Óli Jacobsen.

### Solidaritet!

Gunnleivur Dalsgarð heldur ikki, at tað kann nýtast sum undanførsla, at lønin er góð samanborin við teirra viðurskifti.

– Vit eru eitt framkomið fólk, og tað, sum vit her tosa um, eru yvirklassatrupulleikar. Sjálvandi skulu vit royna at bjarga vinnuni, men tá ið vit bjarga hana upp á bekostning av øðrum, hvussu skulu tey so nærkast okkara livistøði? Hetta er skeivt, og sum fakfelagsmaður haldi eg, at vit skulu vísa solidaritet og hyggja út um okkara egnu garðar. Tað gevur mær ringan smakk í munnin, at almennu Føroyar skulu stuðla uppundir, at onnur standa í stað, sigur Gulleivur Dalsgarð.